## Dýrur Beckham



David Beckham verður dýrur í drift hjá enska fótbóltssambandinum, um hann skal spæla á enska landsliðnum, samstundis sum hann spælir fótbólt í USA. The Sun hevur roknað út, at tað fer at kosta fótbóltssambandinum 260.000 krónur at flúgva Beckham heim til landsdystir restina av hesum árinum. Ongland hevur seks landsdystir eftir at spæla í EM-undankappingini.

## Skotar dyrgja eftir spælara

Skotski landsliðsvenjarin Alex McLeish ætlar at gera eina roynd at fáa álopsspælaran Gabriel Agbonlahor at spæla fyri skotska landsliðið. Agbonlahor spælir fyri Aston Villa í Onglandi, og hann hevur spælt U21 landsdystir fyri Ongland. Mamma hendan Agbonlahor, sum er gávuríkur álopsspælari, er úr Skotlandi, og tí heldur McLeish tað verða eina roynd vert, at fáa hann at skifta til skotska landsliðið. Agbonlahor kann eisini spæla fyri Nigeria, haðani pápi hansara er ættaður.

VB/Sumba – KÍ 1-0 (0-0):

# Sparkaðu sigurin heim

*VB/Sumba*

*KÍ*

**Spark heldur enn spæl, nógvur vindur og eitt nokkso tilvildarligt mál beint fyri leiklok. Tað er tað, sum stendur eftir dystin millum norðasta og sunnasta fótbóltsliðið í landinum, har øll trý stigini vóru verandi í Suðuroy**



*Fagnaðurin var stórur, tá tað loksins aftur eydnaðist hjá VB/Sumba at vinna dyst í Formula-deildini*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

**FÓTBÓLTUR**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Eftir níggju tap og ein javnleik eydnaðist tað loksins VB/Sumba at fáa trý stig aftur. Við tepra eittmáls sigrinum á KÍ, hevur VB/Sumba nú hálað seg upp á sjey stig, og samstundis stytt um fjarstøðuna til liðið omanfyri niðurflytingarmarkið, sum er netupp KÍ.

VB/Sumba spældi sín møguleika og vann fyri aðru ferð í ár. Dagsins hetja var Jón Krosslá Poulsen. Eins og 1. apríl, tá VB/Sumba vann 1-0 á AB, var hann maðurin aftanfyri sigurin, tá hann fekk prikað bóltin í málið stutt fyri leiklok.

Tað var eftir innlegg frá Evrard Ble í høgru, at Jón Krosslá Poulsen við handaru stong setti høvdið á bóltin. Hesin rakti verjuleikara, og so var Jón kvikur á leysa bóltinum og prikaði hann inn.

Tá restaðu fimm minuttir av dystinum, og seinasta løtan tóktist óendaliga lang hjá suðuroyingum. Men tá so bríkslað var fyri seinastu ferð, kókaði alt kring vøllin. Tað var við at vera absolutt seinasta útkall hjá VB/Sumba – nú eru teir framvegis við.

### Vánaligur dystur

Dysturin var annars lítið at rópa hurrá fyri. Nógvur vindur var og hetta tóktist órógva spæli. Í hvussu so er var meiri sparkað enn spælt dystin ígjøgnum. Av uppløgdum møguleikum var heldur ikki nógv at koma eftir. KÍ kom nakrar ferðir aftur til baklinjuna, men so hendi heldur ikki meir. Tann annars altíð vandamikli Paul Clapson varð væl ansaður av Dimitri Jankovic, so hann formáddi sær lítið sunnudagin, og varð eisini skiftur út, tá tað restaðu smáir tíggju minuttir. VB/Sumba hevði heldur ikki heilt so nógv at bjóða upp á frameftir. Eini tveir rímiliga stórar kjansir høvdu teir, men hesir góvu ikki mál.

### Battaríini løgd

Í Suðuroy kom frívikuskiftið væl við. Tað er tungt at tapa, ikki minst tá talan er um níggju tap á rað. Áðrenn henda dystin spældu teir javnt móti AB, so kom var frívikuskiftið, tá landsliðið spældi, áðrenn tørnað varð til aftur í gjár. Steðgin hava suðuroyingar brúkt at løða battaríini, sum vóru við at vera fult uppbrúkt. Og eins og eftir vetrarsteðgin, so vunnu suðuroyingar. Fyri teir er bara at vóna, at battaríini ikki eru fullkomiliga uppbrúkt beinanvegin aftur, soleiðis at tað aftur skulu ganga tíggju dystir, áðrenn næsti sigurin kemur til høldar.

Hjá klaksvíkingum sær tað ikki serliga gott út. Tað byrjaði annars væl eftir venjaraskiftið, og menninir hjá Eyðun Klakstein vístu frálíkan hugburð móti B36. Henda høvdu teir fullkomiliga gloymt eftir í Klaksvík, so stríðsandin og viljin at kempa fyri stigunum, var ikki til staðar. Tað er neyðugt, um tú ætlar at fáa stig úr dystum, har spælið ikki koyrir. Eisini tá mótstøðuliðið eitur VB/Sumba.

## Stórt rós til verjuna

Jón Krosslá Poulsen var skilliga ein serstakliga fegin maður í gjár. – Hetta er faktiskt super, og vit høvdu alvorliga brúk fyri stigunum, staðfesti einsamalli málskjúttin sum tað fyrsta, tá vit fingu orðið á hann eftir dystin. Jón Krosslá heldur seg eisini vita, hvat tað var, sum gjørdi munin í dag. – Verjan koyrdi ótrúliga væl, ja allur verjuparturin koyrdi sum hann skuldi. Stórt rós til teir! Tað hevur tað ikki gjørt annars í ár, men tá hann riggaði, so vísti tað seg eisini at rigga frameftir vøllinum, sigur Jón Krosslá Poulsen. – Vit sóu hetta sum eitt síðsta útkall og vildu vinna. Eisini høvdu vit nakað at hevna síðani síðst. Møguliga undirmetti KÍ okkum eisini eitt sindur, heldur Jón Krosslá Poulsen, sum eisini sigur, at tað var fult uppiborið, at øll trý stigini vóru verandi í Suðuroy.

## Investera ikki nokk

Eyðun Klakstein, venjari hjá KÍ, heldur ikki, at støðan er kritisk í Klaksvík. Heldur ikki nú lið hansara tapti fyri VB/Sumba. – Tað er rætt, at vit hava brúk fyri stigum nú, men støða okkara er ikki kritisk á sama hátt sum hjá liðunum, sum liggja fimm stig aftanfyri okkum. Vit skulu gjarna hála okkum upp eftir stigatalvuni, og vit hava nú fýra dystir eftir fyri summarsteðgin til vinna okkum nøkur stig, sigur hann. Eyðun Klakstein metir, at umstøðurnar at spæla fótbólt í Vági sunnudagin vóru ringar. – Tann nógvi vindurin hevði við sær, at hvørki av liðunum kláraði at fáa spælið at ganga. Dysturin var rættiliga rótutur, og eitt tilvildarligt mál fimm minuttir fyri leiklok avgjørdi dystin. Vit investeraðu ikki nóg mikið í seinna hálvleiki til at kunna vinna dystin, sigur KÍ-venjarin.